

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 12 - 2011

# BP og Halliburton keglast um leka

Bretska oljufelagið BP vil vera við, at amerikanska fyritøkan Halliburton hevur beint fyri ymsum próvtilfari, sum hevur samband við lekan í Meksikoflógva í fjør. Eitt nú skulu starvsmenn hjá Halliburton hava beint fyri upplýsingum um tað betongið, sum bleiv brúkt til at tetta lekan við, men sum ikki virkaði eftir ætlan. Skuldsetingin hjá BP kom á einum rættarfundi í býnum New Orleans, men sambært tíðindastovunum vísti sakførarin hjá Halliburton henni aftur. Eygleiðarar siga, at úrslitið av hesum orðadráttinum kann fáa ávirkan á endurgjaldsspurningin í sambandi við dálkingina, ið stóðst av lekanum. Olja fór at leka úr einum brunni hjá BP við pallin Deepwater Horizon í Meksikoflógva í apríl í fjør, og dálkingin varð søgd at vera tann ringasta í amerikonskum sjógvi nakrantíð. Skaðin var stórur, og næsta ár skal rætturin í New Orleans so taka støðu til endurgjaldskrøvini ímóti BP.